


*Michael F. Nørfelt heldur fram sum blaðstjóri á Motormagasinet*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Motormagasinet nýggjan eigara

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Motormagasinet, sum er fakblaðið hjá donsku bilbransjuni, varð 1. januar 2010 selt til Danske Fagmedier A/S, saman við Transport-magasinet, Licitationen, Mester Tidende og NyhedsInformation, sum øll hava hoyrt til blaðkonsernina Aller Business as. Hesi fimm bløðini halda fram sum áður við hvør sínari redaktión og leiðslu.

Blaðstjórin á Motormagasinet, Michael F. Nørfelt, sum herfyri vitjaði á Sosialinum, heldur eisini fram saman við sínum starvsfólkum. Motormagasinet verður eisini lisið av føroysku bilbransjuni, eins og teir samstarva við bilredaktiónina á Sosialinum um tíðini úr Føroyum.

Motormagasinet er tað einasta av sínum slagi í Danmark. Blaðið, sum kemur út einaferð um vikuna, verður prentað í umleið 12.000 eintøkum.




*Eirikur Lindenskov, blaðstjóri á Sosialinum, og Michael F. Nørfelt, blaðstjóri á Motormagasinet*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Sveisiskur elbilur

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sveisiska fyritøkan Rinspeed, sum designar, tunar og umbyggir ymisk sløg av bilum, verður á altjóða bilaframsýningini í Genéve í mars við einum heilt nýggjum elbili.

Talan er um ein lítlan elbil til býkoyring við tveimum sitiplássum, sum verður drivin av battaríum, ið kunnu koyra 120 kilometrar upp á eina løðing. Bilurin eitur Rinspeed UC, sum stendur fyri Urban Commuter. Hann er einans 2,5 m langur og hevur eina toppferð upp á 110 km/t.

Rinspeed í Sveis varð stovnað av Frank Rinderknecht í 1979. Teir eru hvørt ár við onkrari spennandi nýggjheit á Geneve Motor Show. Í ár er tað fyrstu ferð í 30 ára søguni hjá bilfyritøkuni, at teir koma á framsýningina við einum elbili.




*Rinspeed UC er ein elbilur til býkoyring. Her er ein Rinspeed á veg inn í eitt tok*



*Nýggi Ford Focus sum kemur á marknaðin í 2011*

# Nýggjur Focus í 2011

Ein av stóru nýggjheitunum á altjóða bilaframsýningini, sum í hesum døgum er í Detroit er nýggi Ford Focus í útgávum við fýra og fimm hurðum.

Focus avloysti Ford Escort í 1998, og talan er sostatt um triðju generatión av Ford Focus. Framleiðslan byrjar síðst í 2010, og bilurin kemur á marknaðin fyrst í 2011.

**mg**




*R-serian hjá Scania er kosin Truck of the Year 2010 í Evropa*

# Ársins lastbilur í Evropa

Nýggja R-serian hjá Scania er kosin Truck of the Year 2010 í Evropa.

R-serian er upprunaliga frá 2005, tá hann eisini varð kosin ársins lastbilur. Í grundgevingunum hjá dómsnevndini verður m.a. sagt um R-seriuna hjá Scania, at umframt at bilurin hevur aerodynamiskt design við lutfalsligari lágari luftmótstøðu, hevur hann nógvar innbygdar skipanir, sum økja um produktivitetin og minka um útreiðslurnar hjá eigaranum og økja um komfortin hjá bilføraranum.

**mg**




*Tom Kristensen er kosin besti sportsvognskoyrari hetta seinasta áratíggju av kenda enska motorsportblaðnum Autosport*

# Kristensen besti sportsvognskoyrarin

Danski kappkoyrarin Tom Kristensen er kosin besti sportsvognskoyrari hetta seinasta áratíggju av kenda enska motorsportblaðnum Autosport. Nummar tvey gjørdist Allan McNish úr Skotlandi og David Brabham úr Australia gjørdist nummar trý. Hin danski kappkoyrarin, Jan Magnussen, gjørdist nummar sjey.

**mg**